## Fáa nógvan kongafisk

Íslendski frystitrolarin Þerney úr Reykjavík hevur fingið óvanliga nógvan kongafisk á einari leið vestan fyri Ísland. Skiparin, Kristinn Gestsson, sigur við Morgunblaðið, at hesa tíðina plagar fiskiskapurin ikki at vera nakað serligur vestan fyri landið, mog tí kom tað óvart á teir, at so nógv var at fáa. Túrurin hjá Þerney vardi 33 dagar, og teir høvdu 770 tons í lastimni, tá teir komu á Reykjavík gjáranáttina. Umleið 530 tons eru kongafiskur, og hitt er toskur og svartkalvi. Søluvirðið fyri lastina liggur um sjey milliónir krónur.



## Ongin mannskaði av ferðsluóhappum

Tað hava verið nøkur fá ferðsluóhapp seinasta samdøgrið, men ongin mannskaði var nakrastaðni. Ein bilur fór útav í Svínáum um middnátt. Ein fór á Langasandi klokkan tíðliga í morgun. Eitt ferðsluóhapp var við Válin í gjárkvøldið, tá ein bussur fór útav. Hesir megnaðu sjálvir at fáa bilin uppaftur sjálvir. Seinasta ferðsluóhappið løgreglan nevndi, var at ein bilur fór útav millum Fjarða. Hesin endaði á takinum. Hóast nógvur kavi hevur verið og nógv hálka, so hava ikki verið so nógv ferðsluóhapp.

# Føroyingar blokera útlendsk byggifeløg



*Vit hava rætt og slætt ikki loyvi til at standa modell til, at útlendingar fara avstað við øllum arbeiðnum í Føroyum og tað skal steðgast, siga Ingeborg Vinther og Eli Brimsvík, sum enntá eru til reiðar at seta blokadur í verk*

**Føroysk fakfeløg og arbeiðsgevarar fara nú á kreppufund um støðuna, vit eru komin í, har útlendskar byggifyritøkur fara við øllum arbeiðum í Føroyum. Verður tað neyðugt, eru tey til reiðar at at leggja alt lamið við blokadum**

ARBEIÐSMARKNAÐUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Føroysk fakfeløg og arbeiðsgevarar eru nú til reiðar at seta hart ímóti hørðum fyri at forða fyri, at útlendingar fara avstað við øllum arbeiðum, sum verða boðin út í Føroyum.

Tað er longu greitt, at eitt íslendskt felag sleppur at gera risa arbeiðið at umvæla Landssjúkrahúsið, men tað er greitt, at íslendingar eisini eru í ferð við at fara avstað við øðrum stórarbeiðum fyri nøsini á føroyskum byggifeløgum og føroyskum arbeiðsfólki.

Eitt nú hevur Eli Brimsvík, formaður í Havnar Handverkarafelag, fingið upplýst, at íslendingar hava nógv lægsta tilboðið upp á at gera nýggja ellis- og røktarheimið og økisdepilin fyri sinnisveik í Vági.

### Blokera

Hetta vilja partarnir á føroyska arbeiðsmarknaðinum ikki góðtaka longur.

Tað, sum ikki verður góðtikið, er, at íslendsku feløgini koma til Føroyar við íslendskum arbeiðsfólki, sum koma at arbeiða her fyri nógv lægri løn enn føroysku sáttmálalønirnar.

- Vit taka hetta í allarstørsta álvara og kunnu ikki sita hendur og favn ímeðan alt arbeiðið fer av landinum, sigur Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag.

Hon sigur, at tí eru stig tikin til at halda fund ímillum tey føroysku fakfeløgini og arbeiðsgevafelagið um støðuna.

- Í hesum føri er tað avgjørt mín fatan, at bæði fakfeløg og arbeiðsgevarar draga somu línu, sigur Ingeborg Vinther.

Bæði hon, og Eli Brimsvík, leggja dent á, at kemur tað til skarpskeringar, eru tey til reiðar at seta blokadur í verk fyri at blokera fyri, at øll tey almennu arbeiðini fara av landinum fyri dumpingsprís.

Sjálv arbeiðini kunnu tey ikki steðga.

Men tey kunnu nokta limunum í føroyskum fakfeløgum at hava nakað sum helst við arbeiðini at gera, tvs, at føroyskir bilførarar fara ikki at koyra tilfar til og frá arbeiðsplássunum og føroysk arbeiðsmegi fer ikki at levera timbur, betong og annað tilfar til hesi arbeiði.

### 200 milliónir av landinum

- Vit góðtaka ikki, at útlendsk byggifeløg vinna útbjóðingarnar um øll arbeiðnum í Føroyum, bara tí at tey koma higar við arbeiðsfólki, sum skal arbeiða fyri lønir, sum eru langt undir føroyskum sáttmálalønum, siga tey bæði.

Tí verður tað eitt krav, at politiski myndugleikin setir lóg í gildi, har tað er eitt krav, at allir útlendingar sum koma higar, skulu arbeiða eftir føroyskum sáttmálum.

Fyri at tryggja seg heldur Ingeborg Vinther, at tað einasta rætta er, at ymisk arbeiðsmarknaðargjøld, sum eru prosentgjøld av lønini, verða goldin til føroysk fakfeløg fyri at tey kunnu hava eftirlit við lønini.

- Tað vildu vit hava, tá ið útlendingalógin varð sett í gildi. Men ongin lurtaði og nú sita vit mitt í suppuni, sigur Ingeborg Vinther.

- Sosiala dumping kunnu vit undir ongum umstøðum góðtaka, sigur Ingeborg Vinther.

Bæði hon og Eli Brimsvík vísa á, at Løgtingið hevur sett einar 200 milliónir av á fíggjarlógini til at seta ymisk arbeiði ígongd fyri at varðveita virksemi í teimum krepputíðum, vit eru í.

- Tað kann ikki vera meiningin, at alt skal enda uttanlands, siga tey bæði.

- Minsta krav er, at kappingin skal vera á jøvnum føti.

Bæði Eli Brimsvík og Ingeborg Vinther vóna, at málið verður loyst.

Men eydnast tað ikki, eru vit heilt vist til reiðar at seta blokadur í verk, siga tey bæði.

# Klárt at fara undir Hvalbiartunnil næsta ár

**Landsverk fer at projektera nýggjan Hvalbiartunnil í ár og so er klárt at fara undir arbeiðið, so skjótt politikararnir seta neyðuga peningin av**

HVALBIARTUNNIL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Er politiskur vilji til staðar, verður klárt at fara undir arbeiðið at gera nýggjan Hvalbiartunnil longu næsta ár.

Tað staðfestir Oyvindur Brimnes, stjóri á Landsverki.

Hann sigur, at á fíggjarlógini í ár er peningur settur av til at projektera ein nýggjan Hvalbiartunnil fyri.

Tilsamans hevur Løgtingið sett tríggjar milliónir av á fíggjarlógini fyri í ár til at projektera ein nýggjan tunnil fyri

Og tað arbeiðið fer Landsverk undir í ár.

- Vit fara ígongd við at projektera ein nýggjan Hvalbiartunnil í ár, sigur Oyvindur Brimnes.

Hann sigur, at tað arbeiðið verður liðugt um ársskiftið.

- Á nýggjárinum vænta vit at vera komin heilt langt ávegis við einum projekti.

Men so er spurningurin bara um farið verður undir arbeiðið.

- Tað er alt treytað av, nær tað er politiskur vilji til at fara undir arbeiðið, sigur Oyvindur Brimnes.

Hann staðfestir, at næsta ár verður í øllum førum klárt at fara undir tunnilin, so veldst tað bara um politikararnir seta neyðuga peningin av til arbeiðið á fíggjarlógini fyri næsta ár.

### Ein stór forðing

Hvalbiartunnilin er tann fyrsti tunnilin í Føroyum og hann varð tikin í nýtslu í 1963.

Tað hevur verið staðfest í nógv ár, at hann er alt annað enn tíðarhóskandi, tí hann er so lágur, at teir treylarar, bingjur og ferðafólkabussar, sum vanliga verða brúktir til flutning nú á døgum, ganga ikki ígjøgnum hann.

Hetta darvar tí umfatandi vinnuliga virkseminum í Hvalba ógvuliga illa. Eitt nú hava umboð fyri flakavirkið í Hvalba ført fram, at tað kostar virkinum fleiri hundrað túsund krónur eyka um árið at arbeiða fisk í Hvalba, tí fiskurin skal alla tíðina umskipast á smærri bilar fyri at ganga ígjøgnum tunnilin.

Teir eru eisini við at fáa trupulleikar við ES myndugleikar, tí teir fáa ikki flutt tann virkaða fiskin av virkinum í Hvalba uttan at bróta køliketuna, tí fiskurin skal umskipast.

Umboð fyri flakavirkið í Hvalba hava enntá ført fram, at tað er vandi fyri, at virkið í Hvalba má latast aftur, fæst ikki ein loysn á flutningstruplleikanum.